# Tinghúsið klárt í morgin

**Arbeitt verður av øllum alvi til at gera tinghúsið klárt til fyrsta tingfundin eftir valið, sum verður í morgin**

TINGHÚSIÐ
*Turið Kjølbro*

Nýggja tingmanningin kemur saman í einum nýggjum tinghúsum í morgin. Umvælingin og umbyggingin, sum hava verið í húsinum seinasta árið, eru um at verða lidnar.

– Okkurt smávegis vantar at gera liðugt, men hóast tað, verður tingfundur í húsinum mikudagin. Glas og rekkverk millum áhoyraraplássini og tingsalin er ikki komið, og heldur ikki eru benkurnir, sum áhoyrararnir skulu sita á, komnir. Tí verða stólar brúktir í fyrstu syftu. Tingmanningin brúkar gomlu stólarnir í fyrstuni. Nýggir verða bílagdir seinni, sigur Súsanna Danielsen, stjóri á løgtingsskrivstovuni.



*Heidi Poulsen, arkitekturin, hevur staðið fyri umvælingini og umbyggingini av tinghúsinum*
*mynd: Jens Kristian Vang*

Fyribils verður inngongdin til tinghúsið tann gamla, men hendan verður seinni blendað og nýggj verður ístaðin ímóti bygninginum, sum verður tikin uppí tinghúsið. Hetta verður liðugt til ólavsøku. Arbeiðið at gera síðubygningin lidnan heldur fram.

Stjórin á løgtingsskrivstovuni er væl nøgdur við úrslitið, hóast hon ikki dylir fyri, at henni hevði betur dámað, at nýggj tinghús vórðu bygd eins og ætlað upprunaliga.

– Hóast húsini eru umbygd, eru tey ov lítil. Tað er bara pláss fyri 20 áhoyrarum til dømis. Men tá ið nú valt varð at varðveita tey gomlu húsini, haldi eg, at væl er fingið burturúr, og ljóðviðurskiftini eru ógvuliga góð, sigur Súsanna Danielsen.

Seinasta árið hava tingfólk hildið til í útvarpshøllini, og verða nógvir tingfundir í næstum, verða teir hildnir í útvarpshøllini aftur, tí enn eiga handverkarar og málarar nakrar uppgávur á láni í umbygda tinghúsinum.

Tað er Heidi Poulsen, arkitektur, sum hevur endurskapað tinghúsið. Hon og Karl Jacob Danielsen, byggifrøðingur, vunnu í 1999 kappingina um at tekna eini nýggj tinghús. Tá ið politisku myndugleikarnir heldur valdu at varðveita gomlu húsini og umvæla og umbyggja tey, fekk Heidi Poulsen hesa uppgávuna.

Tinghúsið er upprunaliga frá 1856 og verður sostatt 150 ár í ár. Í tí sambandi verður hátíðarhald á ólavsøku, tá ið nógvir gestir uttanlands koma á vitjan. Størri broytingar hava so verið gjørdar í tinghúsinum í 1907 og í 1977. Umvælingin og umbyggingin eru væl lagdar til rættis. Arkitekturin hevur kunnað seg við gomul skjøl og tekningar av húsinum fyri at finna fram til, hvussu húsini skulu endurnýggjast. Salurin er ljóst gráur, sum er upprunaliturin frá 1856. Bitarnir uppi undir loftinum eru hvítir eins og áður. Eitt av krøvunum til nýggja salin hevur verður meiri pláss. Tí er ein veggur tikin niður, og tingsalurin vendir nú oman eftir ímóti tinghúsvøllinum. Opið er upp í tróðrið, so gomlu bjálkarnir eisini koma til sjóndar.

# Dagføring tekur tíð

**Enn er nevnd ikki sett at endurskoða og dagføra føroysku læraraskúlaútbúgvingina**

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

– Vit eru um at verða liðug við at orða arbeiðssetningin, nevndin skal arbeiða eftir, og tá ið hann er liðugur, verður nevndin sett, sigur Óli Holm, landsstýrismaður.

Seinastu tvey árini hevur nevndin í Føroya Lærarafelag regluliga sóknast eftir, hvat verður av ætlaðu dagføringini av læraraskúlalógini uttan at fingið nøktandi svar.

Spurdur um, hví tað tekur so drúgva tíð at seta nevnd og skriva arbeiðssetning, sigur Óli Holm, at grundin er, at fleiri partar eru inni í málinum.

– Bæði lærara- og pedagogútbúgvingin skulu fevnast av arbeiðinum. Nógvir mátar eru at endurskoða útbúgvingarnar og gera lógir til tær, annaðhvørt eina felags lóg, tvær ymiskar lógir, rammulóg og so framvegis. Stórt sæð eru partarnir samdir um, hvussu farast skal fram, sigur Óli Holm, sum ikki vil avdúka nakað um arbeiðssetningin.

Føroyska læraraútbúgvingin er frá 1980. Ymsar dagføringar eru gjørdar, men bera vit ta føroysku útbúgvingina saman við teim norðurlendsku, er okkara væl afturúrsigld. Okkara grannalond dagføra og endurskoða fólkaskúlalærararútbúgvingarlógir við jøvnum millumbili, eitt nú hava okkara næstu grannalond endurskoðað útbúgvingina tvær reisur seinastu 20 árini.

Fólkaskúlalógin er hinvegin broytt, onkrar broytingar komu í 1992 og ein grundleggjandi nýggj lóg í 1998 og aftur broytingar í 1999, men læraraútbúgvingarlógin fylgir ikki við. Lærugreinir, sum eru kravdar sambært nýggju fólkaskúlalógini, eru ikki enn undirvísingarevni á Føroya Læraraskúla. Tískil er úrslitið, at nýútbúnir lærarar ikki megna at undirvísa sambært nýggju krøvunum.

# Samráðast framvegis





*Málið um savnsrøktina skal sambært semju verða avgreitt í morgin í seinasta lagi*

**Gongst sum Óli Holm, landsstýrismaður í skúlamálum, og Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, vænta og vóna, verður málið um savnsrøktina innan fólkaskúlan loyst**

SAVNSRØKTIN
*Turið Kjølbro*

Evsta mark at avgreiða málið um savnsrøktina er í morgin, mikudag tann 15. mai.

– Eg havi góðar vónir um, at vit koma fram til eina semju, sigur Óli Holm, landsstýrismaður, sum kortini ikki vil siga nakað nærri um, hvussu tingingarnar ganga ella hvør semjan verður.

Eisini Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag, hevði góðar vónir undan triðja samráðingarfundinum mánadagin, sum hon metti fór at verða avgerandi fyri, um tað fer at røkka ella støkka í málinum.

Føroya Lærarafelag hevur fleiri ferðir gjørt vart við, at tað ikki slakar í spurninginum um samsýning til limirnar. Kommunurnar varða av skúlunum og tískil eru tað kommunurnar, sum sambært einum áliti, ið er gjørt um málið, sum eiga fíggjarligu ábyrgdina av savnsrøktini.

Beint eftir páskir komu Føroya Lærarafelag og Mentamálastýrið ásamt um at fara undir tingingar saman við Kommunusamskipan Føroya og Fíggjarmálastýrið um at fáa skipað viðurskifti á savnsrøktini í fólkaskúlanum. Loysnin, sum miðað verður eftir at náa fram til, skal koma í gildi frá komandi skúlaári. Eru tingingarnar ikki lidnar til ásetta dag og eingin semja í eygsjón, verður støðan eins og áðrenn semjuna frá 2. apríl. Tað vil siga, at Føroya Lærarafelag fer at nokta limum sínum at virka sum próvdómarar til skrivligu fráfaringarroyndirnar í fólkaskúlanum í summar. Somuleiðis fer blokadan av savnsrøktini at standa við. Tað merkir, at lærarar framvegis ikki sleppa at røkja serstovur og amboð. Avleiðingarnar av hesum eru, at nógvar serstovur nú í langa tíð hava verið ónýtiligar og næmingar hava tískil ikki fingið frálæru í fleiri lærugreinum.

Føroya Kommunufelag er ikki við í tingingunum. Finna hinir partarnir fram til eina semju, merkir tað, at á nøkrum skúlum í landinum fáa lærarar samsýning fyri at røkja serstovur og amboð, meðan á øðrum skúlum verður støðan óbroytt. Forkvinnan í Føroya Lærarafelag heldur tað verða ógvuliga óheppið fyri nógvar limir.

– Tað, sum er umráðandi nú, er at finna fram til eina semju millum partarnar, sum nú tingast. Eg tori ikki at meta um, um hitt kommunufelagið fer at taka undir við tí, vit kunnu semjast um, sigur Óli Holm.

Spurningurin er so, um semja fæst í lag. Myndugleikarnir vita, at eingin undirvísing verður í teim handaligu lærugreinunum, til málið er loyst.



# Skúli og havnarlag

**Runavíkar Kommuna ger í løtuni útbygging í Glyvra Skúla og nýggja bryggju í Saltangará**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*



*Bygt verður upp í Glyvra skúla fyri umleið eina milión*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Runavík:** Bygt verður upp í Glyvra skúla, og nýtt havnarlag verður gjørt í Saltangará.

Rodmundur Nielsen, borgarstjóri í Runavíkar Kommunu, sigur, at bygd verður ein stova aftur at skúlanum á Glyvrum. Brúk er fyri fleiri hølum, men valt er at gera hetta fyrst, sigur hann.

Ein stova verður bygd upp í skúlan, har bókasavnið væntandi flytir, og so verður verandi bókasavn tikið til skúlastovu.

Kostnaðurin fyri hesa uppíbyggingina fer væntandi at liggja um eina knappa millión, sigur borgarstjórin.

Runavíkar Kommuna er annars við í ætlanunum um at byggja ein stóran felagsskúla til framhaldsdeildirnar í Eysturoy, og fyrireikingarnar til ta verkætlanina halda fram, sigur Rodmundur Nielsen.

Av øðrum, sum kommunan er í ferð við í løtuni, er at nevna nýggja havnarlagið norðan fyri verandi havnaøki í Saltangará.

Undir posthúsinum er gjørd nýggj bryggja, sum verður tikin í brúk fyrsta dagin, sigur borgarstjórin.

Partur av gamla havnarlagnum varð lagt av til oljuútgeðrarhavn, men hóast ikki er líkt til nakra oljuvinnu í summar, sigur Rodmundur Nielsen, at ríkiligt er at brúka nýggja havnarlagið til kortini, hóast oljuhavnin eisini verður brúkt.

Tann útbyggingin, sum nú er gjørd, fer sambært tilboðnum at kosta 12,3 milliónir krónur, upplýsir borgarstjórin í Runavíkar Kommunu.



*Nýggja havnarlagið í Saltangará verður tikið í nýtslu fyrsta dagin*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nú verður liðugt

**Vegastrekkið av Gøtueiði oman á Skipaneskrossin verður liðugt í summar, sigur landsverkfrøðingurin**

VEGAGERÐ
*Edvard Joensen*

**Skipanes:** Vegurin oman av Gøtueiði verður liðugur til at taka í nýtslu seint í summar ella í heyst, sigur landsverkfrøðingurin.

Peningur er settur av til at gera vegin lidnan, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur. Ein millión varð sett av á fíggjalógini, meðan ein eykajáttan upp á tvær milliónir og eitthundraðoghálvtrýsstúsund krónur seinni varð latin.

Skotið er ígjgønum á Gøtueiði, og vegurin er breiðkaður allan vegin oman á Skipaneskrossin, sum nú verður gjørdur til rundkoyring, upplýsir landsverkfrøðingurin.

Innanvert bygdina Undir Gøtueiði er lagt tilfar til breiðking fram við vegnum. Hetta er avlopstilfar frá vegagerðini oman av Gøtueiði, sigur landsverkfrøðingurin.

Gjørt er ikki endaliga av enn, sigur Oyvindur Brimnes, hvar tann vegurin endaliga skal leggjast, so enn verður ikki meira gjørt har, sigur hann.

Í løtuni verður arbeitt á vegnum har inni. Talan er um at gera klárt at asfaltera alt vegastrekkið frá Oyndarfjarðarvegnum Millum Fjarða og út á Skipanes. Tikið verður nú omanav, greiðir landsverkfrøðingurin frá. Meðan tað verður gjørt, eru asfaltmenninir í Leirvíkatunlinum, har asfalterað verður. Eisini hava teir verið norðuri á Eiðisvegnum og lagt slitlag oman á vegin millum Svínaír og Ljósá.



*Vegurin av Gøtueiði oman á Skipaneskrossin verður liðugur seint í summar. Krossurin verður gjørdur til rundkoyring*
*Mynd: Edvard Joensen*

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu

Citroen Xsara
2,0 HDi Stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Citroen Xsara
1,6i stc
km. 23.000, árg. aug. 2000
129.000,-

Citroen Xsara
1,9TD 5H
km. 83.000, árg. des. 1998
120.000,-

Mitsubishi L300
2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
70.000,-

Mitsubishi Lancer
1,5 GLXi 5h
km. 118.000, árg. juni 1992
sýnaður 12'01 50.000,-

Fiat Tipo 5H
km. 109.000, árg. mai 1989
sýnaður 11'01 26.000,-

Ford Sierra 2,0i CLX
4h
km. 110.000, árg. nov. 1991
45.000,-

Hyundai Accent 1,3
LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Peugeot 306
1,9D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Seat Cordoba 1,9SDi
STC. 5h
km. 35.500, árg. aug. 1999
115.000,-

Ford Escort STC.
VAN
km. 95.500, árg. mars 1997
53.000,-

VW Polo
1,9TD
km. 120.000, árg. mai 1996
75.000,-

Nissan Sunny
km. 197.000, árg. jan. 1987
sýnaður 01'02 11.000,-

Mazda 323
1,3 4h
km. 211.000, árg.mars 1989
32.000,-

Mazda 323
1,5 4h
km. 130.000, árg. apr. 1997
75.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820